## Seinasti bygdarráðsfundurin í Leirvík

Í kvøld klokkan 19.30 verður tann seinasti bygdarráðsfundurin í Leirvíkar Kommunu, og sum vanligt hevur verið, verður eisini tann seinasti fundurin í bygdarráðshúsunum á Kulibakka, skrivar kommunan á heimasíðuni. Leirvíkar Kommuna varð skipað í 1918 og er sostatt 90 ár í ár. Men á nýggjárinum fer kommunan í søguna, tí tá leggja Leirvíkar Kommuna og Gøtu Kommuna saman í Eysturkommunu. Tey, sum manna tað seinasta bygdarráðið í Leirvíkar kommunu, eru Dánjal Andreasen, Poul A. Joensen, Ólavur Sjúrðarberg, Jóhan Christiansen, Randi í Jógvanstovu, Joen M. Rasmussen og Fríðgerð Heinesen, sum er borgarstjóri. Tríggir av bygdarráðslimunum í Leirvík halda fram í bygdaráðnum í Eysturkommunu. Tey eru Jóhan Christiansen, Fríðgerð Heinesen og Joen M. Rasmussen.

## Finnast at Kringvarpinum

Starvsmannafelagið finnist harðliga at Kringvarpinum fyri at hava tikið starvsfólk til gísla og hótt tey við uppsagnum. Starvsmannafelagið heldur lítið um, at stýrið fyri Kringvarpið í einum skrivi til Fíggjarnevndina boðaði frá, at neyðugt var við uppsagnum, um kringvarpsgjaldið ikki varð hækkað. - Hetta er ikki fyrstu ferð, vit uppliva, at limir okkara fáa kunningina í miðlunum, áðrenn tey sjálvi fáa hana frá síni leiðslu. Vit hildu hetta var søga nú og átala harðliga slíka viðferð, sigur Starvsmannafelagið.

# Fokus sett á $CO_2$ útlátið

**Á ráðstevnu á Hotel Føroyum í dag verður fokus sett á $CO_2$-útlátið og á veðurlagsbroytingarnar**

RÁÐSTEVNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ein arbeiðsbólkur hevur latið eitt álit úr hondum við heitinum »Skjótt syftur seiður og tungu tøkini«. Hetta álitið miðar ímóti at minka um $CO_2$ útlátið hjá Føroyum við 35% fram til ár 2020.

Vanlig sethús eru ein stórur slúkur, men við at bjálva betur og skifta oljufýr verður mett, at útlátið kann minkast við 11%.

Innan flestu økir verður miðað fram ímóti at minka um útlátið. Innan fiskivinnu skal útlátið minkasr 15%, innan orkuveiting 23%, vatnorkan skal økjast 14% og útlátið innan ferðslu skal minka 1%.

Eisini var sonevndi Íslandskaðalin nevndur. Hetta er kalað, sum skal veita føroyingum orku úr Íslandi, vansin er bara tann, at hetta verður einasta orkukeldan, og hendir nakað, liggja øll í øskukulda. Menn verður, at ein slíkur kaðal kostar 2,7 milliardir.

Annika Olsen, sum hevur økið undir sær, hitti starvssystir sína, Connie Hedegaard, tá hon var fundi um veðurlagsbroytingar herfyri, og tær báðar hava gjørt av at samstarva innan økið.

Eini hundrað fólk taka lut á ráðstevnuni, tað verið seg politikarar, granskarar og embætisfólk.

Ráðstevnan heldur fram seinnapartin.



*Skipaflotin stendur fyri nógv størsta partinum at CO2 útlátinum í Føroyum*

## Endurminningar eftir Sámal á Krákusteini

Hvussu var at liva seinast í nítjundi øld og fyrst í tjúgundu øld í Havn? Í sínum endurminningum Memoir er og Autobiografi fortelur Sámal á Krákusteini um, hvussu tað var at upplivað endan av einahandilstíðini, at vera við til at kalla inn til víðagitna jólafundin 1888 og virkað í tøttum samstarvi við danska embætismannavaldið. Søgurnar eru ofta dramatiskar, sum tá frásøgumaðurin var við til at berjast fyri rættindum hjá havnafólkum, tá ið um træðir ráddi og enntá setti enskumtrolaraskiparaevolvaran fyri pannuna.

Samuel F. Samuelsen, vanliga nevndur Sámal á Krákusteini, eftir staðarnavninum har hann búði, skrivaði alt sítt lív. Í hesi bókini greiður Samuel sjálvur frá. Ljós verður varpað á tíðina frá 1852 til 1930 við Havnini sum miðdepli og lívinum hjá einum, ið livdi tá sum tænastu-, traðar- og útróðrarmaður.

Bókin er á tremur av myndum frá tíðini.

Mentunargrunnur Studentafelagsins gevur út.

# Annika og Connie tosaðu um veðurlagssamstarv

**Annika Olsen, landsstýriskvinna hevur havt fund við Connie Hedegaard, veðurlags- og orkumálaráðharra, um framtíðar samstarvsmøguleikar innan veðurlagsøkið**

POLITIKKUR
*Tíðindaskriv*

Annika Olsen, landsstýriskvinna, hevur undir veðurlagsráðstevnuni í Pólandi havt fund við Connie Hedegaard, danska veðurlags- og orkumálaráðharran, um samstarvsmøguleikar millum Danmark og Føroyar á veðurlagsøkinum.

Annika Olsen vísti á, at tað er umráðandi, at Danmark, sum formligur samráðingarleiðari vegna alt ríkið, inndregur Føroyar í tilgongdina til nýggju veðurlagsavtaluna, sum skal samtykkjast í Keypmannahavn komandi ár.

Landsstýriskvinnan segði eisini, at tað er ein fortreyt fyri at kunna viðgera veðurlagsmálið í Føroyum, at vit á myndugleikastigi og politiskum stigi fáa tær upplýsingar, sum eru fyritreyt fyri at taka tilvitaðar avgerðir í Føroyum. Connie Hedegaard segði seg skilja støðu føroyinga, og at hon vildi gera sítt til at lata dyrnar upp fyri tættari samstarvi í veðurlagsmálum.

Annika Olsen hevur eisini havt fund við grønlendska starvsbróður sín, Kim Kielsen. Tosa varð m. a. um nógvu spurningarnar á veðurlagsøkinum, sum kunnu loysast í felag. Tey bæði samdust um, at enn meira ferð skal setast á samstarvið landanna millum, nú minni enn eitt ár er eftir til nýggj avtala skal samtykkjast á veðurlagsfundinum í Keypmannahavn.



*Annika Olsen, landsstýriskvinna og Connie Hedegaard, danskur veðurlags- og orkumálaráðharri*

## Sjey heimleys fáa eitt heim á jólum

HEIMLEYS
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Í dag letur Blái Krossur upp eitt umsorganarheim í Grønulíð í Havn.

Í fleiri ár hevur verið arbeitt við at finna onkra loysn fyri tey í Føroyum, sum ikki hava ein fastan bústað. Seinastu tíðina hevur Blái Krossur fyrireikað seg til at seta eitt heim á stovn fyri fólki, sum einki heim hava. Heimið er ætlað teimum, sum ikki sjálv megna at fáa sær og fasthalda ein bústað.

Umsorganarheimið letur upp í dag, og flyta tey fyrstu búfólkini inn í dag.

Búplássir eru fyri sjey fólkum.